# Danska landsliðið á Tórsvølli mánadagin

*Mánadagin vandi danska landsliðið á Tórsvølli, og áhugin var sera stórur at síggja donsku stjørnurnar venja*



*Áhugin fyri at tosa við donsku stjørnurnar, toktist sera stórur. Hetta var ikki minst galndandi fyri nýggja venjaraparið*
***Mynd: Álvur Haraldsen***

HEINI Í SKORINI

Tað er ikki hvønn dag, at ein hevur møguleikan at síggja Peter Schmeichel, Allan Nielsen, Thomas Helveg og aðrar fótbóltsstjørnur venja í Gundadali, men mánadagin var møguleikin til staðar hjá fólki, sum vóru stødd í Havn, tí tá vandi danska landsliðið nevniliga á Tórsvølli í Gundadali.

Áhugin var sum sagt sera stórur, at síggja donsku stjørnurnar venja á grasinum í Gundadali, tí fleiri fólk vóru komin saman at hyggja at teimum leikarum, vit vanliga bert síggja í sjónvarpinum. Umframt allar áskoðararnar á áskoðaraplássunum, vóru donsk fjølmiðlafólk í hópatali til staðar, av tí at hetta jú er fyrsti dystur hjá danska landsliðnum undir nýggju venjarunum Morten Olsen og Michael Laudrup.

Tann fyrsti ein bar eyga við, tá hann kom inn á Tórsvøll, var sjálvsagt stóra málverjan Peter Schmeichel, sum stóð og dirigeraði liði sínum, og hetta hava fótbóltsáhugað so ofta sæð hann gjørt bæði á danska landsliðnum, og tá hann leikti við ensku risunum Manchester United.

**Morten Olsen er „boss“**
Mong eygu vóru eisini vend móti venjarunum Morten Olsen og Michael Laudrup, sum báðir hava verið stórar fótbóltsstjørnur í síni tíð. Morten Olsen spældi sín seinasta landsdyst í 1989, meðan Michael Laudrup var við á landsliðnum fyri seinastu ferð í HM í Fraklandi í 1998. Morten Olsen er høvuðsvenjarin, og tað var ta myndina áskoðararnir fingu, tá teir hugdu at venjingini. Morten Olsen var „bossurin“ undir venjing, tað sást skilliga, meðan Michael Laudrup virkaði sum tann meiri afturhaldandi av teimum báðum.

Størstu stjørnurnar á danska landsliðnum, sum í løtuni vitja í Føroyum, eru málverjin Peter Schmeichel, sum umframt at hava vart málið hjá Manchester United, eisini var valdur til heimsins besta málverja.

Síðani er tað Thomas Helveg, sum dagliga spælir á høgra vongi hjá italska stórfelagnum AC Milan, Shalke 04 áleyparin Ebbe Sand, og Jon Dahl Tomasson, sum í løtuni er toppskjútti á danska landsliðnum og dagliga spælir við hollendska stórfelagnum Feyenoord. Aðrir spennandi leikarar vit m.a. kenna frá EM í summar, eru René Henriksen frá Panathinaikos, Thomas Gravesen, sum júst er farin til Everton og Jan Heintze, sum spælir við hollendsku meistarunum PSV Eindhoven. Allar hesar stjørnur vóru sostatt at síggja mánadagin, og spennandi verður at síggja, hvussu føroysku leikararnir fara at fóta sær í kvøld móti dønum.

# Jon Dahl Tomasson: Vit hava virðing fyri føroyingum

*Núverandi toppskjúttin á danska landsliðnum, Jon Dahl Tomasson, sigur, at teir hava virðing fyri føroyska landsliðnum*

Heini í Skorini

- Tað er eingin ivi um, at tað verður ein torførur dystur, er Feyenoord áleyparin Jon Dahl Tomasson skjótur at svara, tá hann verður spurdur, hvat hann væntar av dystinum í kvøld millum Føroyar og Danmark.

Jon Dahl sigur, at føroyingar hava fingið nøkur sera góð og imponerandi úrslit í EM undankappingini, og sipar hann her til EM undandystin millum Føroyar og Skotland, sum endaði 1-1, tá Hans Fróði Hansen skallaði bóltin í netið í síðstu minuttunum á Svangaskarði.

- Eitt, sum eg havi lagt til merkis, er, at vøllurin er lítil, sum vit fara at spæla á, og tað er avgjørt ein fyrimunur fyri teir, sigur Jon Dahl Tomasson.

Hann leggur dent á, at um føroyingar fara at spæla verjukendan fótbólt, er tað ein fyrimunur at vera á einum lítlum vølli, tí tá verður torførari hjá dønum at spæla seg ígjøgnum føroysku verjuna.

Spurdur, hvat hann kennir til føroyska landsliðið, sigur Jon Dahl, at sum hann segði, hava teir fingið góð úrslit í seinastu kapping, og veit hann eisini eitt sindur um leikararnar sum spæla í Danmark.

- Eg veit, at teir leikarar sum spæla í Danmark, eru sera góðir, og teir kunnu geva okkum trupulleikar í kvøld.

Jon Dahl sigur, at endamálið við dystinum í kvøld, er at fáa roynt nýggjar leikarar, nýggja liðuppstilling og nýggjan taktikk, tí tað er um tvær vikur, at tað veruliga gerst týdningarmikið .

- Og so skulu vit sjálvandi eisini vinna dystin, Leggur Jon Dahl Tomasson afturat.

Tá prátið kemur inn á EM í Belgia og Hollandi í summar, verður Jon Dahl spurdur, um teir ikki hava nakað at prógva eftir eitt miseydnað EM, har danir taptu allar tríggjar dystirnar í bólkaspælinum.

- Nei, tað haldi eg ikki. Europameistaraheitið í summar er av, og nú ræður um hjá okkum at koma víðari og ikki hugsa um tað longur. Vit hyggja frameftir, og nú vilja vit hava stig í komandi dystum okkara, sigur Jon Dahl Tomasson at enda.



*- Tað er eingin ivi um, at tað verður ein torførur dystur, heldur Jon Dahl Tomasson*
***Mynd: Jonhard Hammer***

# Páll givin

*Íslendska DV skrivar í dag, at Páll Guðlaugsson ikki longur er venjari hjá Kaflavík*

JÁKUP MØRK

Sambært íslendska blaðnum gjørdi leiðsla felagsins av siga Páll ur starvi, eftir at Keflavík í steypakappingini mátti lúta fyri FH.

Páll er annar venjarin í Íslandi, og hin fyrsti í bestu deildini, sum er farin úr starvinum í úrtíð hetta kappingarárið.



*Páll Guðlaugsson er ikki longur venjari hjá Keflavík*

Vegna plásstrot komu greinarnar um landsdystin ikki við í mikudagsblaðið. Vit biðja lesararnar halda okkum til góðar




## Kunngerð

**Hin árliga kappsiglingin á Skálafirði, ið Lions Club Eysturoy skipar fyri við 4- og 5-mannaførum, verður sunnudagin 27. august 2000**

Luttakarar, ið ynskja at vera við í siglingini, skulu tekna seg hjá Símun Rasmussen, Strendur, tlf. 447165, John Rasmussen, tlf. 448641, ella Jóannes Niclassen, Skála, tlf. 441249, í seinasta lagi fríggjadagin 25. august.

Samstundis verður hetta seinasta siglingini hjá felagnum »Seglið« í ár, hvar Føroyameistararnir verða funnir.

Siglingarnevndin

## KUNNGERÐ

**Um framløgu av byggisamtykt fyri Oyndarfjarðar kommunu**

Sambært grein 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 við seinni broytingum, verður við hesum gjørt kunnugt, at byggisamtykt fyri Oyndarfjarðar kommunu 2000-2001 verður løgd fram til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni í Oyndarfirði frá 21. august 2000 til og við 08. september 2000. Tó skal verða gjørt vart við, at skrivstovan bert er opin mánadagar millum kl. 17.00 og 19.00, men kunnu áhugað um neyðugt seta seg í samband við bygdaráðið fyri at fáa atgongd til málið aðrar tíðir.

Møgulig mótmæli móti uppskotinum og broytingaruppskot til hetta, ið skulu vera skrivlig, skulu vera Oyndarfjarðar bygdaráð í hendi í seinasta lagi **20. november 2000 kl. 16.00**.

*Oyndarfjørður, tann 14. august 2000*

**Oyndarfjarðar bygdaráð**

## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** VW Bora 1,9 TDI
**Árg.:** 1999
**KM:** 22.500
**Eyka-útgerð:** El-rútar, sentrallás, síðu airbag, 5 gear, metall lakk, diff. sperru el. og 1896 ccm. TDI motor.

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú og kann síggjast á Bilasøluni hjá Øssur Johannesen, Vegurin Langi, 188 Hoyvík.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Beinleiðis tlf. 34 57 28 - fartelefon 21 57 28
fax nr. 34 56 07

Magni Petersen
at hitta millum kl. 13.00–15.00

## Føroya Handarbeiðsskúli heystið ár 2000

**Skeið í veving**
Lært verður at tekna mynstur, rokna út, gera renning, seta í vevin og veva turrikløð, teppir o.a.

Skeiðið verður hesar dagarnar: 4/9 - 5/9 - 6/9 - 11/9 - 13/9 - 15/9 - 18/9 - 20/9 og 22/9
Undirvísari: Jacobina Heinesen
Tilmelding á tlf. 455278
Kosnaður: 400,- + tilfar

**Skeið í broderí**
Lært verður at : Brodera/montera turriklæði, fyriklæði og kýsa til føroysk klæðir.
Bodera vest til føroysk klæðir.
At gera bregdað-, hosu- og tólvtáttabond.

Skeiðið verður hesar dagarnar: 1/9 - 15/9 - 29/9 - 6/10 - 20/10 - 3/11 - 17/11 og 1/12
Undirvísari: Paulina Eliasen
Tilmelding á tlf. 456614
Kosnaður: 400,- + tilfar

**Skeið í tøving**
Lært verður at tøva stykkir og at forma til ymiskar brúkslutir. At prýða við broderí og bondum.
Formtøva hattar, húgvur, skógvar, taskur o.a.
Lita ull, tøva myndir og prýða við broderí.

Skeiðið verður hesar dagarnar: 5/9 - 6/9 - 19/9 - 20/9 - 3/10 - 4/10 - 17/10 - 18/10 og 31/10
Undirvísarar: Anna Evensa Abrahamsen og Paulina Eliasen.
Tilmelding á tlf. 457152
Kosnaður 400,- + tilfar

**Skeið í knipling**
Grundskeið í knipling.

Skeiðið verður hesar dagarnar: 14/9 - 21/9 - 28/9 - 5/10 - 26/10 og 16/11
Undirvísari: Anna Evensa Abrahamsen
Tilmelding á tlf. 457152
Kosnaður 300,- + tilfar

**Skeið í garving**
Lært verður at garva skinn og roð

Undirvíst verður í viku 43 (23/10 til og við 27/10)
Undirvísari: Karin Jacobsen
Tilmelding á tlf. 455598
Kosnaður 300,- + tilfar

**Skeið í seyming**
Lært verður at seyma veitsluklæðir til vaksin fólk.

Undirvíst verður í viku 45 ( 6/11 til og við 10/11 )
Undirvísari: Ruth Laksafoss
Tilmelding á tlf. 455264
Kosnaður 300,- + tilfar

Tilmeldað skal verða 14 dagar áðrenn skeiði byrjar. Um tilmeldað verður til meir enn eitt skeið verður avsláttur latin.

Undirvíst verður hvønn dag frá kl. 8.00–14.30

**Føroya Handarbeiðsskúli**
Bøgøta 3 · FO 700 Klaksvík · Korttelefon 456674

***Um skúlan:***
*Skúlin byrjaði í 1995. À skúlanum hava verið nógv ymisk skeið, longri og styttri. Skúlin er ein dagskúli.*
*Um tað eru einstaklingar ella bólkar, ið hava onkur serstøk ynskir um skeið, kunnu tit ringja á tlf. 457152 - 455278 - 456614*

## Lærlingur

**søkist til handil okkara á Hálsi sum skjótast**

Læran umfatar:
Samskifti við viðskiftafólk, sølu, skeið og annað fyrifallandi handilsarbeiði.

Vit vænta:
At tú ert sjálvstøðug/ur, arbeiðssom/samur, røkin, fyrikomandi og hevur hug og hegni til at veita kundum okkara eina góða tænastu.

FHS ella HH er ein treyt.

Skrivlig umsókn skal vera Profa Farvur í hendi í seinasta lagi 31. August 2000.

team 85 · 31 65 11

**Profa Farvur**
Postboks 3137 - Staravegur 5 - FO-110 Tórshavn

## dan-Job

søger unge piger til vintersæson 15.12.2000 til skirestauranter i Schweiz. Flere af vore kunder søger personale (30–40) til køkken, værelse, service og afrydderjobs i Schweiz vintersæson 2000/1.

**www.danjob.dk · Tlf. 0045 75 7110 00**

## NÝGGJ KIROPRAKTOR OG AKUPUNKTUR KLINIKK

letur nú upp á Norðurstíggi 11 á Argjum og í Heilsumiðstøðini í Runavík. Viðtala fæst á tel. 32 02 12 ella 44 81 02.

*Ári Rasmussen*

Sosialurin - 311820